# ítróttur

Nr. 219 • týsdagur • 16. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Andrew og Jón Rói býttu stigini

**Føroyska uppgerðin í donsku 1. deild millum Fremad Amager og Frem endaði við málleysum javnleiki. Jón Rói Jacobsen var sannførandi í Frem-miðverjuni, meðan Andrew av Fløtum fekk 65 minuttir í Fremad Amager-álopinum**

DANSKA 1. DEILD
*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*



*Andrew av Fløtum (nr. 7) og Jón Rói Jacobsen (uttast høgrumegin) høvdu fleiri nærdystir í føroysku uppgerðini í donsku 1. deild millum Fremad Amager og Frem. Úrslitið var ein málleysur javnleikur, og føroysku avrikini vóru sum heild góð*
*Mynd: Dan Hirslund*

**Keypmannahavn:** Í køldu donsku heystarluftini høvdu um 2200 áskoðarar leitað sær út í Sundby Idrætspark á Amager til dystin millum Fremad Amager og Frem sunnudagin klokkan 13. Fleiri føroyskir útisetar vóru eisini komnir at hyggja at føroysku uppgerðina í donsku 1. deild, og føroysku áskoðararnir fingu loyvið at eygleiða eina uppgerð millum fyrrverandi HB-liðfelagarnar Jón Róa Jacobsen og Andrew av Fløtum.

Jón Rói loysti sum vanligt uppgávu sína til fulnar í Frem miðverjuni, meðan Andrew stóð fyri einum rímiliga góðum avriki teir 65 minuttirnar, hann fekk í álopinum hjá Fremad Amager. Hinir báðir føroyingarnir úti á Amager, Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør, vóru ikki í hópinum og eru eftir øllum at døma á veg heim til Føroya næsta kappingarár, meðan ungi føroyski eykamálverjin í Frem, Gunnar Nielsen, enn bíðar eftir møguleikanum.

### Andrew dráladi

Endaliga úrslitið var 0-0, og talan var ikki um nakran vælleiktan dyst. Hóast nógv álop og fleiri hálvar royndir megnaði hvørgan liðið at skapa teir heilt stóru málmøguleikarnir, og á runuta grasundirlagnum tyktist torført at fáa samanhangandi spæl í lag. Hinvegin var talan um ein fysiskt eyðkendan dyst við nógvum nærdystum, sum m.a. endaði við einum reyðum korti til Fremad Amager-leikaran Dennis Danry 15 minuttir fyri leiklok.

Fremad Amager byrjaði best og hevði yvirvág í fyrra hálvleiki, og við føroyskum brillum var hæddarpunktið, tá Andrew av Fløtum gjørdist rímiliga leysur men drálaði ov leingi og fekk tí ikki skot á málið. Eitt gott mótálop, men Jón Rói og hinir í Frem-verjuni megnaðu at halda tørn.

Hóast leikliga yvirvág til heimaliðið var størsti málmøguleikin í dystinum uttan iva, tá ein Frem áleypari einsamallur inni í fimmteiginum skallaði bóltin framvið víðopnum máli. Frem leikararnir hildu seg hava fingið leiðsluna, og navnframi Frem venjarin Ebbe Skovdahl leikaði í á síðulinjuni.

Annars vóru Jón Rói Jacobsen og Andrew av Fløtum meiri enn einaferð í hornatøkum. Tað lá væl fyri hjá Andrew at taka ímóti frá miðjuni, venda og spæla bóltin víðari, men tað gjørdist tó sjáldan vandamikið fyri Jón Róa og liðfelagarnar.

### Frem trýsti

Í seinna hálvleiki kom Frem meiri inn í dystin, og í 65. minutti varð Andrew skiftur út við formsterka kappingarneytan í álopinum, Thomas Myssing. Uttan tær stóru skreytirnar kom landsliðsáleyparin tó hampiliga væl frá dystinum, og sostatt var Jón Rói einsamallur føroyingur á vøllinum seinastu 25 minuttirnar.

Dysturin kundi koppað báðar vegir, og bæði liðini høvdu hvør sítt skot á stólpan. Men tá 15 minuttir vóru eftir at leika, gjørdist heimaliðið ein færri, og eftir reyða kortið royndi Frem við áhaldandi trýsti at gagnnýta yvirtalsstøðuna.

Men hóast trýstið megnaði Frem ikki at skora, og 0-0 var endaliga úrslitið millum Jón Róa Jacobsen og Andrew av Fløtum. Hóast Frem trýstið seinastu løtuna, var javnleikurin eitt rættvíst úrslit millum tey bæði útisetaliðini, og sum heild komu báðir føroyingarnir væl frá uppgávuni.

### Frem nr. 2

Nú er vetrarsteðgur í donsku 1. deild, og Jón Rói og Frem liggja á øðrum plássi við 31 stigum, fýra stig aftanfyri Johan Byrial Hansen og AC Horsens. Frem liggur sostatt til kvalifikatión um uppflyting í Superliguna.

Føroyingafelagið á Amager hevur verið partur av oddastríðnum, men við ov nógvum javnleikum seinastu umførini er Fremad Amager nú dottið niður á eitt 7. pláss við 24 stigum.



*Talan var ikki um tað stóru fótbóltsupplivingina í Sundby Idrætspark sunnudagin, tá føroyingafeløgini Fremad Amager og Frem leiktu ein málleysan javnleik*
*Mynd: Dan Hirslund*



H71-KÍF 28-34 (12-15):

# Klókir kollfirðingar

**Ungu kollfirðingarnir hugsaðu bæði meira, betri og skjótari enn hoyvíkingarnir, sum við óvæntaða tapinum mistu týðandi fet í oddastríðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast hoyvíkingar royndu at stríðast, so eydnaðist teimum ongantíð at fáa veruligt tak á KÍF, sum á degnum var bæði betri og klókari enn H71*

Tann klóki lumpar tann minni klóka. Soleiðis søgdu Grimm-brøðurnir í einum av fablum sínum, og tað er eisini ein veruleiki, sum ofta er staðfestur í ítróttarhøpi. Seinasta dømi um hetta var sunnudagin, tá oddaliðið, H71, tók móti, sum fyri tað mesta hevur riðið hampuliga lágt higartil í kappingarárinum.

### Óklókir hoyvíkingar

Í øllum førum kann staðfestast, at tað var ikki so øgiliga klókt hjá hoyvíkingunum at taka nakað lætt upp á uppgávuna. Ivaleyst hevur tað verið ótilvitað, at so varð, men tað hevur ferð eftir ferð verið prógvað, at hetta sjáldan lønar seg.

Og svarið frá kollfirðingum kom eisini alt fyri eitt. So skjótt, sum dysturin byrjaði, togaðu kollfirðingarnir seg avstað, og tó at H71 royndi, so gekst illa at fáa fatur á mótstøðuni aftur. Ikki minst, tí KÍF veruliga hevði sett sær fyri at taka av møguleikanum, tá hesin beyðst.

Við verjuspæli, sum einamest hevði til endamáls at halda stóru skjúttunum hjá H71 í góðari fjarstøðu, eydnaðist teimum á fyrimyndarligan hátt at avmarka hesa hóttanina hjá vertunum, og tá hoyvíkingar hvørki høvdu hugflog ella evni til at spæla tunt, ella til at skapa nakrar yvirgongdir, kundu kollfirðingarnir soleiðis alla tíðina halda mótstøðuni í skák. Størsti spurningurin í so máta tóktist vera, hvørt KÍF kundi spæla allan dystin við verjuni somikið langt úti.

Ein lítla løtu eftir steðgin tóktist tó, sum komu hoyvíkingarnir aftur. Ivaleyst høvdu teir nýtt steðgin til at tosa um tingini. Sletta nakað av køldum vatni í blóðið og annars semjast um, at enn kundi dysturin vinnast.

Og hetta sá eisini út til at halda. Roynt varð nakrar ferðir at spæla tunt, og hetta førdi skjótt við sær, at verjan hjá KÍF noyddist nakað longur inn, soleiðis at hon nú gjørdist ein 5-1. Við altíð stríðsfúsna Jóan Paula Olsen sum eittara, gjørdi hetta tó ikki uppgávuna stórt léttari hjá H71.

Og so hoyrir tað eisini við til søguna, at hoyvíkingarnir enn einaferð fullkomuliga megnaðu at missa høvdið. Hetta longu tá einir tíggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. Teir høvdu annars vunnið KÍF aftur, og fleiri ferðir stóð á jøvnum á talvuni. Men tað var, sum um rapaði korthúsið, tá KÍF skeyt seg upp á 22-20. Hoyvíkingarnir royndu framvegis at stríðast, men eftir hetta komu teir ongantíð veruliga í nánd av mótstøðuni. Ferð eftir ferð endaðu hálvhjartaðar royndir hjá H71 við kontra til KÍF, og so var Jóan Pauli aloftast kvikur avstað. At KÍF seinastu løtuna økti úr 29-27 í endastøðuni, 34-28, sigur helst eisini tað mesta um, at tá hevði H71 givið upp.

### Eitt spennandi lið

Hóast tað soleiðis á ein hátt var mest sum av egnum ávum, at hoyvíkingarnir soleiðis snávaðu, so skal einki takast frá kollfirðingum av teirri orsøk.

Við seks stigum higartil hevur liðið longu nú gjørt flestu spádómum – m.a. hjá yvirritaða blaðmanni – fyri skommum. Hóast talan er um einstakar veteranar, so er sum heild talan um ein sera ungan hóp, har flestu av leikarunum tykjast vera í eini áhaldandi menning. Sjálvsagt er talan um liðspæl, men tað slepst tó illa undan at nevna teir báðar, Regin Petersen og Gert Hansen. Regin var saman við Mirko Milenkvic arkitekturin handan tað mesta av tí, sum KÍF framdi, og á strikuni tykist Gert nærkast alt meira eini møguligari landsliðsúttøku. Og so eigur Jaspur Joensen, sum fyri tað nógva hevur vart KÍF-málið í ár, eisini rós. Ikki tí hann hevði so nógvar fantastiskar bjargingar, men hann dugur at standa har, sum hann skal standa, og so fekk hann fatur á nógvum, hóast tað ikki altíð sá út av so nógvum. Tað er jú eisini eitt kynstur hjá einum málverja.

Hjá H71 mundi dysturin meira enn nakað undirstrikað, at einki kemur av sær sjálvum. Tað var ein áminning til leikararnar um, at verandi støðan er íkomin, tí allir hava stríðst í felag til hvørja einastu uppgávu, og at hetta framhaldandi er neyðugt, um góða støðan skal varðveitast.

Samstundis slepst ikki undan at nevna, at dysturin sjónliga gav til kennar, hvussu stóran týdning Halgir Dahl Olesen hevur fyri liðið. Hesa ferð hevði hann ein reguleran off-dag, har hvørki skotstyrkin ella stríðsviljin vóru í nær námind av tí, sum tað vanliga er. Og tað var kanska størsti veikleikin við avrikinum hja H71 hesaferð.

## FAKTA UM DYSTIN

**H71-KÍF 28-34 (12-15)**
**Málskjúttar**
**H71:** Henrik Gerster 12(2), Piti Negru 4, Esbern Patursson 3, Kent Failstrup 2, Høgni Joensen 2, Halgir Dahl Olesen 2, Johnny Durhuus 2, Olaf Vestergaard 1
**KÍF:** Jóan Pauli Olsen 7, Regin Petersen 6, Gert Hansen 6(3), Arnbjørn Hansen 5, Teitur Joensen 5, Mirko Milenkvic 3, Rógvi Weihe 2
**Brotskøst:** H71 2, KÍF 4
**Útvísingar:** H71 1, KÍF 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen. Kundu væl lagt eina meira avgjørda og kontanta linju.

# Fimm dagar til fyrireikingar

**Lítla viku frammanundan verður tað greitt, hvørjir partarnir skulu vera í steypafinaluni á Ólavsøku**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Finalan um løgmanssteypið verður framvegis á Ólavsøku. Higartil hevur tað verið soleiðis, at í síðsta lagið fyrst í juli hevur verið greitt, hvøji tvey feløg skulu standa fyri fótbóltsundirhaldinum Ólavsøkudag. Soleiðis verður tað ikki næsta ár.

Sambært uppskoftinum um steypakapping, sum FSF leygardagn legði fyri feløgini, so verður seinna hálvfinalan ikki fyrrenn sunnudagin 24. juli ella fimm dagar undan sjálvum finaludegnum.

Sum áður umrøtt so hevur FSF havt ætlanir um, at tað skal farast frá bólkaumfarinum í steypakappingini, sum tey seinastu árini hevur verið mett lítið áhugavert. Í staðin verður cup skipanin galdandi frá fyrsta umfarinum, sum er ásett at vera spælt 13. mars. Tá skulu átta feløg spæla um fýra pláss í áttanda parts finaluni.

Áttanda parts finalan verður 20. mars ella vikuskiftið frammanundan, at fyrsta umfarið í landskappingini verður á skránni.

Fjórðingsfinalurnar verða spældar Kristi Himmalferðardag ella hósdagin 5. mai. Í hálvfinalunum er ætlanin at spæla bæði á heimavølli og útivølli. Tann fyrra verður mikudagin 6. juli, og tann seinna verður sunnudagin 24. juli, og so verður tað greitt, hvørji feløg skulu fyrireika seg til finaluna, sum verður á Ólavsøku.